# Inuittar blivu misbrúktir

Katólska kirkjan í USA hevur gjørt av, at 110 fólk í nøkrum bygdum í Alaska skulu fáa tilsamans 50 mió. dollarar í endurgjaldi, tí jesuittaprestar og -trúboðarar misbrúktu teir flestu dreingirnar í bygdunum kynsliga í árunum frá 1961 til 1987. Tað eydnaðist prestunum og trúboðarunum at fjala brotsverkið, sum tó kom undan kavi í 2002, tá katólska kirkjan í USA mátti í rættin í fleiri slíkum málum. Fleiri av teimum misbrúktu dreingjunum beindu fyri sær.



*Teir misbrúktu fáa umleið 2,5 mió. krónur í part í endurgjaldi (Mynd: Los Angeles Times)*

# Tríggir stoyttu saman



*Tríggir bilar í samanstoyti um 16:30-tíðina í gjár*

Mynd: Jens Kristian Vang

Seinnapartin í gjár var eitt ferðsluóhapp við innkoyringina til Sandvíkarhjalla. Tríggir bilar vóru við í samanstoytinum. Av Polistiøðini í Havn verður upplýst, at teir hava skrivað frágreiðing í málinum. Neyðugt var hjá tí eina bilføraranum at fara á Landssjúkrahúsið til kanningar. Hann hevði smekkað andlitið í frontrútin og brotið nøsina, helst tí at hann ikki sat í trygdarsela. **sb.**

# Tosa um ábyrgd og við kvinnur

**Hetta vikuskiftið fær Keldan í Skálafirði vitjan av hjúnunum Erik og Hildu Bedsvaag. Møtir verða hildin frá fríggjakvøldi til sunnudag**



*Hjúnini Erik og Hilda Bedsvaag vitja í Skálafirði hetta vikuskiftið*

Leygarmorgunin verður eitt serstakt kvinnumøti, har Hilda ynskir at tosa við føroyskar kvinnur.

Sagt verður um hana, at hon hevur nógv uppá hjartað til kvinnuna. Hon gav herfyri út eina bók, sum umtalar kvinnuna burturav, og tí hevur hon nógv at siga frá.

Samstundis við hetta tiltakið kemur Lydia Petersen úr Klaksvík at vitja. Hon er litráðgevi og kemur at geva kvinnunum ráð um sniðskap og litir.

Seinnapartin leygardagin verður fundur, har Erik fer at tosa um leiðslu. Við hetta høvið ynskir hann at hitta fólk innan leiðslu og ábyrgd fyri tænastum í samkomum kring landið.

Vitjanin endar sunnudagin kl. 17, tá Erik Bedsvaag talar við eitt møti í samkomuni.

**sb.**

# Skulu hereftir velja í ítróttarhøllini

**Vestmanna:** Fólkatingsvalið í farnu viku var seinasta valið, har vestmenningar skuldu á val á kommunuskrivstovuni í bygdini.

Á seinasta bygdaráðsfundi varð tosað um at flyta valstaðin hjá vestmenningum í ítróttarhøllina í bygdini.

Tilmælið frá trivnaðarnevndini um hetta varð einmælt samtykt.

Nú verður meiri høgligt hjá eldri fólki og rørslutarnaðum at sleppa á val.

**sb.**

# Eingin snellufiskur at fáa




**Sandur:** Snellubátarnir sum royna vestanfyri hava lítlan fiskiskap í løtuni. Hetta hendir, hóast veðrið er gott.

- Tað sær út sum um fiskurin er uppi hesaferð, skrivar heimasíðan bkv.fo.

Sagt verður, at línubátarnir kortini fáa eitt sindur meiri.

Hinvegin kunnu menn fegnast um, at prísurin er sera góður.

**sb.**

*Snellubátarnir av Sandi hava lítlan fiskiskap í løtuni*

Mynd: bkv.fo